## Samkynd og revsulógin

Í kvøld, hóskvøldið 9. novembur skipar Føroyahúsið fyri pallborðsfundi um tað málið, sum øll hava havt á máli í farnu viku og gjørt sær sína hugsan um. Leingi hevur verið ætlanin at fáa hetta í lag, men nú gjørdist tað meira aktuelt enn nakrantíð áður. Ætlanin er at fáa málið um samkynd og revsilógina lýst gjølla, eins væl og hvussu hetta verður tengt upp í mannarættindi, politisk og átrúnaðarlig sjónarmið.

Fundurin verður kl. 19. Við pallborði sita m.a. Sonja Jógvansdóttir, ráðgevi, Bogi Davidsen lækni og Margretha Petersen, lesandi. Flovin Eidesgaard verður fundarstjóri.

## Ókeypis e-roknskapur

Aesiras Busines & Internet er ein nýggj bókhaldsskipan, sum nú kann heintast ókeypis av netinum. Felagið handan skipanina sigur, at talan er um eina kompletta loysn til fíggjarskipan, sum hartil inniheldur innbygdar internet-loysnir. Skipanin inniheldur 25 ymiskt modul, og av hesum eru tey fyrstu 10 ókeypis. Meira kann lesast um skipanina á www.aesiras.dk, har forritið eisini kann takast niður.

# Tjóðveldisflokkurin klagar Óla Breckmann

**Óli Breckmann noktaði tinglimum at fáa orðið í Løgtinginum og hann kallaði framferðina hjá tjóðveldisflokkinum ein glantrileik og eitt sirkus**

Løgtingið
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Óli Breckmann saboterar arbeiðið í Løgtinginum.

Tað heldur Høgni Hoydal í Tjóðveldisflokkurin.

Og misnøgdin við Óla Breckmann er so stór, at tjóðveldisflokkurin nú fer at klaga hann fyri løgtingsformanninum, Edmundi Joensen.

Óli Breckmann sat í formanssætinum í Løgtinginum í gjár og stýrdi orðaskiftinum, tá ið spurnarumfar har, har løgtingslimir høvdu høvi til at syrja Løgmann og landsstýrismenn um alskyns viðurskifti.

Men í gjár gjørdust meiri rokaligt í Løgtinginum enn vit eru von við á okkara leiðum.

Rættiligur orðadráttur tók seg upp, tá ið Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum spurdi Løgmann, hvørjar búskaparligar grundgevingar eru fyri skattalættanum hjá samgonguni.

Men Løgmaður vildi ikki svara, tí hann metti, at spurningurin átti at verðið stílaður til Bárð Nielsen, landsstýrismann í fíggjarmálum.

Tað førdi so til, at sitandi Løgtingsformaður gjørdi av at geva spyrjaranum, Høgna Hoydal orðið einaferð afturat "til eitt ordiligt útfoldilsi", sum hann málbar seg, men so skuldi orðaskiftið enda og fleiri tinglimir fingu sostatt ikki orðið.

Tá ið tinglimir mutaði ímóti, endaði tað við, at sitandi Løgtingsformaður kallaði spurningin fyri glantr og hann kallaði eisini tað, sum fór fram í Løgtinginum fyri eitt sirkus.

Høgni Hoydal gjørdi alt fyri eitt greitt, at hann ætlaði at klaga sitandi formann og ta klaguna sat hann og skrivaði í morgun.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur, at tað er Edmund Joensen, sum er valdur Løgtingsformaður og tí er klagan um Óla Breckmann stílað til hansara.

– Talan er um ein fyrispurning, sum er latin Løgtingsskrivstovuni dagin fyri og góðkendur har. Tí er tað ótrúliga langt úti, at Óli Breckmann skal gera seg til dómara yvir, hvat er borðbært ella ikki.

Høgni Hoydal heldur, at tað er fullkomiliga óhoyrt í einum fólkaræðiligum samfelagi, at Óli Breckmann brúkar formanssessin í Løgtinginum til beinleiðis at sabotera arbeiðið hjá Løgtinginum og noktar tinglimum at taka orðið.



Formaður Tjóðveldisfloksins vísir á, at arbeiðið hjá formansskapinum í Løgtinginum er at tryggja, at Løgtingið fær gjørt sítt arbeiði og skal tryggja, at verja rættin hjá tinglimum at fáa svar.

– Tí kæra vit eisini um, at Løgtingsformaðurin ikki ístaðin átalar Løgmann fyri ikki at svara einum spurningi frá einum tingmanni.

Høgni Hoydal sigur, at hann vil nú hava formansskapin í Løgtinginum at viðgera kæruna og koma til eina niðurstøðu um, hvat er rætt og, hvat er skeivt í hesum máli.

Óli Breckmann hevur onga viðmerking til málið, men vísir til sjálvan løgtingsformannin, Edmund Joensen.

## Umbering til Hans Paula Strøm

Í grein í Sosialinum í gjár kom eg illa frá tí, tá ið eg umrøddi ein skrivligan fyrispurning í Løgtinginum frá Finni Helmsdal og Bill Justinussen til Hans Paula Strøm, Landsstýrismann um Serdagsstovnin á Argjum.

Í yvirskriftini stendur, at Hans Pauli Strøm verður skuldsettur fyri at siga ósatt fyri Løgtinginum um peninganýtsluna til Serdagsstovnin á Argjum.

Tað er eitt álvarsmál og tað er heldur ikki rætt. Tað, sum spyrjarnir siga í fyrispurninginum, er, at Hans Pauli Strøm hevur upplýst skeiv tøl í Sosialinum og tí vilja teir hava hann at greiða Løgtinginum frá, hvussu tað ber til.

Nú, aftaná, gerst ikki annað enn at rættað mistakið og at biðja landsstýrismannin um umbering.

Men fyri at tað skal vera heilt greitt, skal eisini upplýsast, at tað er ikki rætt, tá ið Finnur Helmsdal og Bill Justinussen siga í fyrispurninginum, at tað var Hans Pauli Strøm, sum kom við nevndum upplýsingum um peninganýtsluna hjá Serdagsstovninum, tí upplýsingarnar høvdu vit frá Almannastovuni.

**Áki Bertholdsen, blaðmaður**

# Hetta var ikki nóg gott

**Edmund Joensen, løgtingsformaður, heldur, at tað, sum fór fram í Løgtinginum mikudagin, varð ikki nóg gott**

LØGTINGIÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað, sum hendi í Løgtinginum mikudagin, var ikki nóg gott.

Edmund Joensen, Løgtingsformaður heldur, at Óli Breckmann, sum sat í formansætinum í Løgtinginum ein part av mikudegnum, hevði ikki eina nóg hepna hond, tá ið Høgni Hoydal spurdi løgmann um búskaparliga sjónarmiðið fyri skattalættanum. Sí greinina omanfyri.

Men hann vit ikki útgreina hetta nærri.

Hann sigur, at tá ið klagan frá Tjóðveldisflokkinum kemur, verður hon viðgjørd og eitt svar skrivað.

Annars føldi Edmund Joensen sjálvur, at tað var neyðugt at geva løgtinginum, landsstýrinum og Løgmanni eina áminning sum, hvussu farast skuldi fram í sambandi við munnligar fyrispurningar.

Hann staðfesti, at spurningar skulu verða stuttir og greiðir og at summir spurningar, ið settir vóru fram, vóru óegnaðir til ein munnligan spurning, tí teir vóru so umfatandi, men áttu heldur at verið settir skrivliga.

Hinvegin vísti hann eisini á, at landsstýrismenn og Løgmaður eiga at biðja um at fáa spurningar skrivliga, tá ið teir meta, at teir eru ov umfatandi.

Annars staðfestir Løgtingsformaðurin, at eftir tingskipanini hava tinglimir fullan rætt at seta spurningar.

– Men Løgtingið er ein politiskur pallur og tí er mangan nógvur politikkur í spurningunum, men tað er ein fullur rættur hjá tinglimum, tí soleiðis er tingskipanin.